Trúðu upp á tað

Eyðbritt Krosslá fegnaðist um sigurin, sum hon sjálv helt var úrslit av, at VB alla tíðina trúi upp á møguleikan

STEYPAVINNARI
Jákup Mørk

Nú mugu tit geva okkum rætt, helt Eyðbritt fyri, tá sigurin móti VÍF endiliga var vísur. Og rætt skal vera rætt. Eftir steypasigurin má VB í øllum førum metast sum fremsti FM-biðilin hjá kvinnum
Mynd: Álvur Haraldsen

- Trúgva tit okkum nú? Okur hava alla tíðina sagt, at VB verður fremst í ár, og nú mugu tit geva okkum rætt.

Eyðbritt Krosslá var sjálvandi ovurfegin, tá steypasigurin hjá VB var veruleiki. Sum ein av avgjørdu veteranunum í føroyskum kvinnuhondbólti hevur hon roynt tað mesta. Eisini at vera steypavinnari, men enn hevur hon ikki verið føroyameistari, men ætlar hon sær at fáa við, áðrenn hondbóltskarrieran verður skúgvað til viks.

Í øllum førum vildi hon ikki tosa um at gevast, tá vit eftir dystin spurdu hana, um dystuirin leygardagin eins og hjá Alis Høghamar skuldi verða hennara seinasta steypafinala.

- Tað veit eg ikki. Um vit verða meistarar, so gevist eg, men annars noyðist eg nokk at taka eitt tørn afturat, helt hon fyri.

Hildu fast

Um sjálvan dystin helt Eyðbritt annars avgjørd, at tað uttan størvegis hóvasták var byrjanin, sum vissaði teimum sigurin.

Eina viku undan hesum hevði VB vunnið trygt á VÍF, og veteranurin á liðnum helt eisini, at hetta mundi hava gjørt sína ávirkan.

- Tað at tað gekk soleiðis í Vági gjørdi í øllum førum, at vit trúðu upp á sigurin. Og vit fingu eisini eina framúr byrjan. Tað var bara, sum um alt riggaði, so sjálvt um tað gjørdist hart móti endanum, so hildu vit alla tíðina fast.

Komu ov seint ígongd

- Álopið hjá okkum koyrdi ikki í fyrra hálvleiki, og tað er fyrst og fremst tað, sum kostaði okkum dystin helt Alis Høghamar eftir sína seinastu steypafinalu
Mynd: Álvur Haraldsen

Alis Høghamar iðraði seg um avrikið hjá VÍF í fyrra hálvleiki, sum hon helt kostaði teimum steypafinaluna leygardagin

SILVURMERKIÐ
Jákup Mørk

Í síni seinastu steypafinalu mátti Alis Høghamar ásanna, at hon og liðfelagarnir úr VÍF gjørdust akkurát ov stuttar, tá samanumkom. VB var yvir ein kamb stinnara liðið, og tó at VÍF gjørdi eina seinastu roynd, so megnaðu tær akkurát ikki at toga seg upp á javnleikin, sum hevði givið longda leiktíð.

- Ja, høvdu vit megnað tað, so ivist eg ikki í, at vit høvdu vunnið, men tað kann so gera tað sama. Vit fingu ikki spælið at koyra í fyrra hálvleiki, og tað kostaði okkum dystin, helt hon.

Álopið koyrdi ikki

Sum kunnugt, so spældu júst VB og VÍF eisini fyri viku síðani. Ein dyst, sum VB vann stórt, men hóast nakrir parallellar kundu dragast millum hesar báðar uppgerðirnar, so helt Alis ikki, at hetta hevði havt nakran týdning.

- Sjálv haldi eg í øllum førum ikki, at tað hevði nakað at siga. Men tað var bara so, at vit fingu ikki álopið at koyra. Í steðginum broyttu vit sum so einki, men tosaðu enn einaferð um tær avtalur, sum vit høvdu gjørt undan dystinum, og spakuliga fór tað so at ganga rætta vegin.

Hetta vísti seg tó at vera ov spakuligt, og úrslitið gjørdist, at VÍF fyri fyrstu ferð í trý ár mátti taka til takkar við silvurmerkjum. Nakað sum eisini tykist vera ávegis í landskappingini, men her heldur Alis ikki, at alt er mist.

- Vit eru samstundis væl við í kappingini, so nú ræður um hjá okkum at arbeiða víðari. Fyrst og fremst mugu vit rætta mistøkini, sum eru framd í seinastu dystunum, men alt í alt haldi eg meg kunna siga, at eg síggi fram til, at vit fara at reisa okkum, segði Alis Høghamar at enda.

Fekk einki gjørt

Í ítrótti er tað nú einaferð soleiðis, at tú ert ikki glaður serliga leingi í senn. Vit verða framhaldandi noydd at stríðast fyri FM, helt VB venjarin í løtunum eftir, at steypasigurin var tryggjaður

STEYPAVINNARI
Jákup Mørk

- Tað vóru jú fleiri støður, har vit við einum einstakum máli kundu avgjørt dystin, men hvørja ferð kom VÍF aftur í dystin, helt VB-venjarin um seinasta korterið ella so av steypafinaluni
Mynd: Álvur Haraldsen

Einki er at ivast í, at tað stóð nógv á hjá VB-venjaranum, Aivaras Daugis, seinastu minuttirnar av steypafinaluni. Eftir dystin var hann eisini skjótur út úr skiftirúminum, har leikararnir feiraðu steypasigurin, tí nú ráddi um at fáa eina sigarett, soleiðis at nervarnir kundu koma nøkun lunda upp á pláss aftur.

Fær ikki gjørt nógv

Meðan alt soleiðis spakuliga kom upp á pláss aftur í høvdinum, spurdu vit Aivaras, hvussu tað kendist at sita á beinkinum, tá somikið nógv stóð á leikarunum. Og ikki minst, hvør hansara leiklutur í hesum er.

- Satt at siga, so veit eg ikki, um tað er gjørligt at greiða frá, hvussu mann hevur tað. Sum venjari er eisini avmarkað, hvat tú kanst gera í slíkum støðum. Tú kanst royna at tosa við leikararnar, og biðja tær renna her og har, men yvir høvur er okkara leiklutur ógvuliga lítil, tá somikið nógv stendur á. Tá eru tað leikararnir, sum mugu gera arbeiðið, og tað gjørdu tær tíbetur.

- Skal eg vera heilt erligur, so var eg at enda eisini bangin fyri, at nú fór tað ikki at ganga. Tað vóru jú fleiri støður, har vit við einum einstakum máli kundu avgjørt dystin, men hvørja ferð kom VÍF aftur í dystin, men nærri enn tí eina málinum komu tær so ikki.

Júst hetta, at VB megnaði at halda fast um eina leiðslu, tykist vera størsti munurin á liðnum í ár, og so tey tvey-trý seinastu árini. Tað er sum um leikararnir í ár duga betri at halda høvdið kalt, tá mest stendur á, og tað eru eisini fleiri, sum tilskriva Aivaras Daugis størsta heiðurin fyri hetta.

Sjálvur tykist venjarin tó ikki at vera serliga nøgv at taka sær heiðurin fyri hetta.

- Tað haldi eg ikki, at eg skal góðskrivast fyri. Tað er nokk meira eitt úrslit av teimum royndunum, sum leikararnir fáa, so hvørt tær gerast eldri. Mín uppgáva er fyrst og fremst at fyrireika leikararnar so væl sum gjørligt til hvønn dyst, ljóðar lítillætna svarið.

FM bíðar

Eitt er steypasigurin. Annað er FM-stríðið, har VB framvegis hevur ein sera aktivan leiklut.

Tá tosið fellur inn á hetta, er eisini skjótt, at venjarin hevur hug at skúgva júst vunna sigurin til viks. Ikki soleiðis, at gleðin ikki framvegis var intakt, men heldur í eini ásannan av, at enn eru stór mál fyri framman.

- Nú skulu vit sjálvandi feirað hendan sigurin í kvøld, men síðani er tað so ikki til meira enn tað. Í ítrótti er tað nú einaferð soleiðis, at tú ert ikki glaður serliga leingi í senn. Vit verða framhaldandi noydd at stríðast fyri FM, so mín uppgáva verður kanska fyrst og fremst at fáa leikararnar niður aftur á jørðina, segði ein nú róligur venjari at enda.

Oddaliðið fekk harða viðferð

Júst sum klaksvíkingar tyktist at vera á sigurskós, glapp fyrsta plássið teimum úr hondum eftir skrædl móti havnarmonnum. Bert eitt umfar er eftir at leika

TALV



Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Aftur nú kom vend í toppinum í 1. deild. Sera óvæntað. Fimmfaldaði føroyameistarin Heini Olsen er heima í Føroyum í hesum døgum, og leikti tí við í dystinum móti havnarmonnum. Oddaliðið hevði tí allar møguleikar at renna frá hinum liðunum við hesum sterka liðnum á pappírinum; Heini Olsen, Ólavur Simonsen, Rani Nolsøe og Tummas M. Anthoniussen.

Martin Poulsen var aftur á havnarliðnum og hetta gjørdi góðan mun. Hann leikti remis móti Heina, meðan hinir tríggir havnarmennirnir vunnu síni talv. Olaf Berg hevði eitt skifti í liðkappingini eitt stig av fimm, men eftir góða sigurin á Ólavur sunnudagin, hevur hann nú fimm av níggju. Sterkt komið aftur av 16 ára gamla evnaríka telvaranum.

Rani vil helst skjótt gloyma hesa liðkapping. Móti Herluf hevði hann góða støðu, men tíverri fyri hann leikti hann skeivt og tapti. Haldur Suni Johansen vann eitt drúgvt talv á Tummas Martin á fjórða borði.

Eitt óvæntað úrslit, sum merkir at støðan í toppinum aftur broyttist. Liðini í 1. deild hava til felags at verða óstøðug.

Jens Kristian tapti

John Jacobsen úr Vestmanna gjørdi tað sum eingin higartil hevði megnað, nevniliga at vinna á Jens Kristian Hansen. Toftamaðurin hevði 7,5 av 8 undan dystinum móti vestmenningum.

Dystin vunnu vestmenningar, heldur óvæntað, 2,5 - 1,5. Liðið flytur niður í 2. deild, men vilja allarhelst enda kappingina við manér og fella við æru.

Í Hvalvík var - sum í Havn - toppdystur. Kollfirðingar vóru á vitjan og vunnu 3-1. Hetta merkir at teir saman við klaksvíkingum og toftamonnum røkja annað pláss, eitt stig aftan fyri havnarmenn. Hvalvíkingar eru nú hálvttriðja stig frá toppinum, men kunnu teoretiskt (kundi kanska sagt realistiskt um vit hugsa um merkisverdu gongdina í ár) enn vinna FM, um teir fáa fulla úrtøku móti vestmenningum og hini úrslitini lagað seg. Sí støðuna í blaðnum í dag.

Hvør vinnur?

Klaksvíkingar hava hóast tapið í vikuskiftinum, góðan møguleika. Teir hitta botnliðið úr Vestmanna, meðan havnarmenn hava torføran dyst móti kollfirðingum. Spennandi verður í øllum førum. Toftamenn kunnu eisini gera sær dælt av, at havnarmenn kanska fara at lata nøkur stig móti kollfirðingum.

Seinasta umfar verður leygardagin 22. februar, og verða tá dystirnir hesir:

KT - HT
TT - TFS
KTF - VT

Hans Kristian vann HT-Open

Tað blivu teir tríggir, Hans Kristian Simonsen, Olaf Berg og Ólavur Simonsen ið, sum framanundan væntað, myndaðu toppin í jubileumskappingini í Havnar Telvingarfelag. Hans Kristian varð rættiliga suvirenur og vann øll síni talv, harav sjálvsagt eisini móti Ólavur og Olaf.

Millum teir tjúgu luttakararnar, royndu heilt nógvir unglingar seg. Helgi D. Ziska, sonur Andrias Ziska, og Margeir Berg, beiggi Olaf Berg, endaðu báðir á einum flottum deildum fjórða plássi.

Toppurin

Hans K. Simonsen	9,0/9,0
Olaf Berg	7,5
Ólavur Simonsen	7,0
Herluf Hansen	5,0
Andrias Ziska	5,0
Súni Ziska	5,0
Helgi D. Ziska	5,0
Margeir Berg	5,0

Hans Kristian Simonsen gjørdist vinnari av jubileumskappingini hjá Havnar Telvingarfelag

1. deild 9. umfar

Heima	Úti	Úrslit
HT	KTF	3,5-0,5
Martin Poulsen	Heini Olsen	0,5-0,5
Olaf Berg	Ólavur Simonsen	1-0
Herluf Hansen	Rani Nolsøe	1-0
Haldur Suni Johansen	Tummas M. Anthoniussen	1-0
VT	TT	2,5-1,5
John Rødgaard	Bogi Ziska	1-0
John Jacobsen	Jens Christian Hansen	1-0
Jákup á R. Andreasen	Wensil Højgaard	0,5-0,5
Niels O. Durhuus	Helgi Joensen	0-1
TFS	KT	1-3
Martin Brekká	Hans Kristian Simonsen	0-1
Finnbjørn Zachariassen	Torbjørn Thomsen	0-1
Bergur Magnussen	Eyðálvur Johannesen	1-0
Gunnar Joensen	Grettir Djurhuus	0-1

Undan seinasta umfar

Lið	Stig
1. HT	20,5
2. KTF	19,5
3. TT	19,5
4. KT	19,5
5. TFS	18,0
6. VT	11,0

HT 2	RT	1,5-2,5
KTF 2	ST	2-2
HT 3	VT 2	0,5-3,5

Støðan í 2. deild

Lið	Stig
1. ST	26,0
2. RT	21,0
3. KTF 2	19,0
4. HT 2	15,5
5. VT 2	15,5
6. HT 3	11,0

Talvið hesa vikuna

Kasparov — Deep Junior 3-3

Í seinasta talvteigi frættist, at støðan millum heimsins besta telvara nakrantíð og heimsins bestu talvteldu, var 2-2. Og í farnu viku blivu seinastu tvey talvini leikt í hesum sera áhugaverda dysti.

Fimta og sætta talv endaðu við javnleiki, og tískil bleiv støðan 3-3, sum nokk skal tulkast sum eitt lítil niðurtúrur fyri menniskja. Tá Kramnik í oktober leikti 4-4 ímóti Deep Fritz, vónaðu flest øll at Kasparov fór at tæna menniskjanum betri og vinna á tøknini. Men tá tveir teir sterkastu telvararnir í heiminum ikki megnað at knekka køldu talvteldunum, hvør kann so? Møguliga átti indarin Anand at fingið kjansin, men flestu serkønu meta ikki nakran hava betri møguleikar enn júst Kasparov og Kramnik.

Dysturin í New York vakti stóran ans. Allir miðlar fylgdu væl við Kasparov og hansara roynd at knekka telduna. Ikki minst vórðu interneteheimasíðurnar væl vitjaðar, við milliónum av vitjandi til hvørt talvið.

Í eftirmetingini av dystinum, segði Kasparov eitt nú, heldur eyðmjúkur, at vit menniskju lítlar møguleikar hava at basa tøknini. Troyttleiki spælur stóran leiklut, eins og trýst kann niðurseta møguleikar at hugsað nágreiniliga. Tað er eitt serligt trýst á einum at leika móti teldum, segði ein skuffaður Kasparov eftir sætta og seinasta talvið. Kasparov hevði við ætlan sætta talvinum var ikki at tapa, sum hevði víðført eitt líknandi tap sum í 1997, tá Deep Blue avgjørdi dystin teirra millum í júst sætta talvinum og vann 3,5 — 2,5. Hann var tí nøgdur við javnleik, hóast hann hevði betri støðu.

At kalla í øllum seks talvunum hevði Kasparov byrjanarfyrimun, men lykilin er at umseta tað til stig, og sum Kasparov sjálvur sigur, er hetta sera torført móti millimetra-presisum telduútrokningum.

Í fimta talvinum loypti Deep Junior hvøkk á Kasparov og áskoðarar kring heimin, tá teldan offraði bisp longu í 10 leiki. Í fyrstani gjørdu flest øll gjøldur burturúr offrinum, men nakrir leikir seinni endaði talvið javnt, tá Kasparov ikki metti seg verða føran fyri at verja seg, um hann rann undan við konginum. Allarhelst ein rætt avgerð, bleiv mett eftir talvið. Her er nevnda talvið:

Kasparov,G (2847) - Deep Junior
FIDE Man vs Machine WCh New York (5), 05.02.2003

1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 Bb4 4.e3 (tann tryggi varianturin í Nimzoindiskum) **4...0—0 5.Bd3 d5 6.cxd5 exd5 7.Rige2 Re8 8.0—0 Bd6 9.a3** (Kasparov leikar varið her. Hann hevur ætlanir um f3, e4, men vil fyrst útvikláð seg frúgvamegni) **9...c6**

10.Fc2
Bxh2+! (óvæntað at ein telda ger slíkt. Offrar fyri gott spæl. Hetta er eitt tekin um at talvteldur rættiliga verða útviklaðar á ein menniskjaligan hátt) **11.Kxh2 Rig4+ 12.Kg3** (**Kg1? Fh4**) **12...Fg5 13.f4 Fh5 14.Bd2** (rókasamband og besti leikur) **14...Fh2+ 15.Kf3 Fh4** (og kasparov fór nú nærum í koma. Hugsaði 1/2 tíma og valdi at "baila" út) **16.Bxh7+** [Kasparov hugsaði um hesar møguleikar hjá svørtum: 16.g3 Fh2 *(16...Rih2+ 17.Kf2 Rig4+ 18.Ke1 Fh3)* 17.f5 h5. báðir variantar eru torførir at telva ímóti. Í øllum førum vildi Kasparov ikki fara út í slíkar støður] **16...Kh8!** (frúgvaavbýti hevði verið betri fyri hvítan) **17.Rig3 Rih2+ 18.Kf2 Rig4+** [18...Nxf1? 19.Rxf1 Fxh7 20.Rh1]

19.Kf3 Nh2+ remis